# ÆVINTÝRINI HJÁ DÁNJALI

**TÓNLEIKURIN** HEVUR LEITT **DÁNJAL Á NEYSTABØ** GJØGNUM NÓGV ÆVINTÝR KRING HEIMIN OG GIVIÐ HONUM EITT **ÓTAL** AV UPPLIVINGUM. FRÁ AT VERA Í KLØRNUM HJÁ **FBI Í USA**, TIL AT VERA PARTUR AV HOLLENDSKUM **POPPBÓLKI**, SUM VARÐ SPÆLDUR Á **RUSSISKA MTV** OG AT LIVA SUM LANDASTROK Í **HOLLANDI** SAMAN VIÐ **FÝRA BULGARUM**, IÐ HANN STEIKTI EINA **ROTTU** SAMAN VIÐ



SAMRØÐA
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Einferð var tað ein drongur, sum saman við vinmonnum sínum hevði gjørt bólkin Snarljós. Tíggju ára gamlir spældu teir í B36-húsinum í Gundadali í Havn. Trý løg vóru á skránni. »I Just Called To Say I Love You« hjá Stevie Wonder, »Winds of Change« hjá Scorpions og »Á Gud, tað er hart at spæla fótbólt« hjá Black Birds. Teir, sum mannaðu Snarljós vóru Hallur Johannesen, Halgir Arge, Bjarni Skaalum, Bárður Olsen og Dánjal.

Sum við so mongum øðrum ævintýrum byrjaði tað í smáum. Men tað gingu ikki nógv ár, so var B36-húsið og Snarljós skift út við bólkin Hanky Stuff og tónleikakapping í Danmark.

– Vit spældu til DM í Rock og komu í 1/8-partsfinalurnar. Tá vit spældu brendi anleggið saman og soleiðis ruku vit úr kappingini. Vit fingu at vita, at vit kundu koma aftur og spæla seinni, men kappingin koyrdi víðari og vit vóru úti, greiðir Dánjal á Neystabø frá, sum tá var 16 ára gamal.

## Søgusigarin

Í dag er Dánjal 31 ára gamal. Síðani hann og vinmenninir í Hanky Stuff – og ikki Hunky Staff, sum fyrireikararnir av DM í Rock av misgávum kallaðu teir – hevur tónleikurin hálað Dánjal kring knøtttin. Tónleikurin hevur givið honum upplivingar og leitt hann gjøgnum mong ævintýr.

Hetta fortaldi Dánjal mær eftir eina konsert í í Keypmannahavn í november. Tað var í samband við eitt mentanartiltak, at Dánjal á Neystabø spældi á Hovedbiblioteket inni í býnum. Millum sangirnar fortaldi hann eina rúgvu og hevði fleiri viðmerkingar til pallborðsfundin, sum hevði verið áðrenn konsertina. Dánjal hevði nógv upp á hjarta, tað var eyðsæð. Tí fór eg til hann eftir konsertina og spurdi, hví vit ikki høvdu hoyrt meira um hann sum persón í almenna rúminum.

Frágreiðingin var rímiliga lang og torgreið. Stutta svarið var, at Dánjal metti, at hann dugir ov illa at marknaðarføra seg sjálvan. Helst er tað nakað um tað. Hinvegin dugir hann sum fáur at siga søgur, og søgan um ævintýrini hjá Dánjali byrjar her.

## FBI handtók Dánjal

Dánjal var á tónleikaskúla í Seattle í USA í átta mánaðir, eftir at hann meiri ella minni varð tveittur úr 10. flokki. Har fekk Dánjal eyguni upp fyri jazztónleikinum, sum síðani hevur fylgt honum.

Tað var eisini í Seattle, at Dánjal rendi seg inn í løgregluna, sum hevði illgruna um, at 16 ára gamli Dánjal á Neystabø, var ein rúsevnissmuglari úr Sveits.

Tað ljóðar ótrúligt, men sambært Dánjali sjálvum, er søgan sonn. Hann var í klørnum hjá FBI, sum hevði hann undir illgruna fyri smugla rúsevni.

»De amerikanske slipsemænd var stålsatte og overbeviste om, at de havde fundet deres mand. Men til sidst lykkedes det Dánjal at føre dokumentation for sandheden. At han var i Seattle for at spille jazz«, skrivaði danska blaðið Politiken, sum hevði gjørt samrøðu við Dánjal á Neystabø, áðrenn eina konsert í marsmánaði í fjør.

## Johnny Boy byrjaði Ævintýraferðina

Síðani kom Tangz-tíðin. Rókur Jákupsson Jacobsen, Hallur Johannesen, Rói Christiansen, Halgir Arge og Dánjal mannaðu væl umtókta bólkin, hvørs hæddarpunkt var triðja plássið í Prix Føroyum í 2001.

- Vit høvdu nógv nøvn. Funny Boys og Happy Friends kallaðu vit okkum onkuntíð, men vit broyttu navn alt eftir hvat høvi var. Til onkra kvøldsetu á Stundentaskúlanum itu vit Kv-ølsetan og til ein føðingardag, brúktu vit navnið Hap-ib-birthday, fortelur Dánjal, meðan hann flennir eftir fleiri øðrum meiri og minni kreativum nøvnum.

Síðani kom Tangz-tíðin. Rókur Jákupsson Jacobsen, Hallur Johannesen, Rói Christiansen, Halgir Arge og Dánjal mannaðu væl umtókta bólkin, hvørs hæddarpunkt var triðja plássið á Prix Føroyum í 2001.

Eitt lag, fólk minnast Tangz fyri, er countrysangurin »Johnny Boy«. Nakað, sum fólk flest ikki vita av, at tann sangurin – óbeinleiðis – var byrjanin til Ævintýraferðina.

- Í øllum førum var tað fyrsti sangurin, Búi og eg skrivaðu saman, fortelur Dánjal á Neystabø. Sostatt byrjaði ævintýrið um Ævintýraferðina við tveimum ungum havnarmonnum, sum gjørdi eitt countrylag til bólkin Tangz, sum annars mest spældi progressivan rocktónleik.

## Spældur á russiska MTV

Eftir lokið studentsprógv flutti Dánjal til Göteborg í Svørríki, har hann byrjaði á tónlistaskúla. Har var hann í eitt ár, áðrenn hann flutti til Malmö og byrjaði á konservatoriinum har. Steðgurin í Malmö gjørdist tó heldur ikki langur, og Dánjal gjørdist skiftisnæmingur í Groningen í Hollandi.

- Tað var eitt feitt stað. Eg hevði ein fastan klaverlærara, restin vóru gestalærarar, sum komu beinleiðis úr jazzumhvørvinum í New York, undirvístu okkum í eina viku og fóru so avstað aftur. Tað var øgiliga spennandi, men mínar ambitiónir løgu ikki júst har, greiðir Dánjal á Neystabø frá.

Hann spældi kortini eina rúgvu av tónleiki hetta tíðarskeiðið. Millum annað saman við nøkrum fólkum, sum mannaðu ein poppbólk.

- Bólkurin var ikki tað stóra í Hollandi. Men av onkrari orsøk vóru tey ógvuliga væl umtókt í Russlandi, og tey spældu løg hjá okkum á MTV har, fortelur Dánjal á Neystabø, sum fór við hesum bólkinum til Russlands at spæla.

Í Murmansk í Russlandi ikki bara undirhelt Dánjal við tónleikinum, hann byrjaði eisini at undirvísa.

- Eg var 24 ára gamal, fekk mat, eitt stað at sova og eitt sindur av dagpengum. Næmingarnir, sum vóru 20 ár og lítið yngri enn eg, vóru sera arbeiðssamir og vandu 16 tímar dagliga. Tey spældu klassiskt og vóru ótrúliga dugnalig. Nógv betri enn eg. Tey dugdu bara ikki at spæla jazz, men tað kundi eg læra tey, samstundis sum eg lærdi eina rúgvu av teimum. Hetta var ein spennandi tíð, greiðir Dánjal á Neystabø hugtikin frá.

Einaferð – eisini meðan Dánjal var í Russlandi – skuldi hann spæla konsert við einum hollendskum bólki. Ikki tí, hann kom til Russlands við, men einum øðrum. Tá tey komu til hotellið, har tey skuldu spæla, rendi Dánjal seg í ein trupulleika.

- Eg hevði sagt, at eg spældi klaver og bað um, at eitt tílíkt skuldi standa

▶